# MASKINMAÐUR

Søkt verður eftir royndum maskinmanni at byrja skjótast til ber. Talan er um virkini í skopun og heima á Sandi.

Løn sambært avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Martin Olsen, virkisleiðari á tel 211 316.

Umsóknir skulu sendast til:

**SANDOY SEAFOOD**
**240 Skopun**
**Att. Andreas F. Hansen**

SUNDA KOMMUNA

# Summarfrí

Kommunuskrivstovan er stongd í viku 30 og 31.

Barnaverndartænastan er tó at hitta á tlf. nr. 771023 sum vanligt.

**Sunda kommuna**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

# Pioner

– hin vælumtókti plastbáturin



- Stoyptur í einum
- Við dupultum skrokki
- Søkkur ikki
- Góðkendur av Norsk Veritas
- Fæst í nógvum modellum
- Vit hava Honda leysamotorar til bátarnar

Sosialurin 341800

**Føroya Arbeiðarafelag**

# ÁMINNING til limir felagsins

Vit skulu minna limir okkara á, at limur sum gerst arbeiðsleysur ella sjúkur, kann halda áfram í Felagslívstryggingarskipanini til 67 ára aldur, við at gjalda eitt ávíst mánaðargjald til FA – gjaldingin **skal** byrja áðrenn 3 mánaðar frá tí, at limurin er givin at arbeiða.

Limir fáa nærri upplýsingar við at venda sær til FA á tlf. nr. 312101.

# Jónas Broncksgøta 5 til sølu



Við hesum verður ognin matr. nr. 526 1, Tórshavn, lýst til sølu. Talan er um ein eldri bygning frá umleið 1950, ið stendur sera væl fyri í Tórshavn. Grundøkið er 738 $m^2$. Bygningurin er í trimum hæddum, í alt 294,7 $m^2$. Ognin hevur verið nýtt sum skrivstovuhøli, og hevur allar neyðugar installatiónir. Ognin liggur í 2. grundumráði, og eru tí góðir møguleikar fyri víðkan.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til skrivstovu okkara.

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22 · Boks 106
FO-110 Tórshavn
Telf. 359595 · Fax 359596
E-mail: advokat@advokat.fo

Magnus Heinasonargøta 23. 1,
Postboks 205, FO-110 Tórshavn
Tel 31 89 03, Fax 31 87 03

bókhaldsvirkið **RannTeld**

Bókhald - Skuldararøkt - Ráðgeving - Skattauppgerð

# Matstova til sølu

Vegna viðskiftafólk selja vit vælrikna og vælvitjaða matstovu í leigaðum hølum í miðbýnum í Tórshavn.

Í matstovuni er alt nýmótans innbúgv og útbúnaður og verður hon seld um nóg høgt boð fæst.

Seriøs áhugaði kunnu venda sær til okkum á telefon 31 89 03 ella 50 53 00, telefax 31 87 03 ella t-post: rannteld@post.olivant.fo

RannTeld er eitt bókhaldsvirki, sum røkir skrivstovu-, bókhalds- og aðrar uppgávur fyri einstaklingavirkir, smápartafeløg og partafeløg. Eftirspurningurin eftir teimum tænastum RannTeld veitir er støðugt vaksandi, samstundis sum tænastuumráðið eisini økist í hvørjum. RannTeld byrjaði í sítt virksemi í 1991 við einum starvsfólki. Í dag hevur RannTeld fýra fólk í starvi.

# Summarfrí

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá 17. juli til 1. august.

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Fólk til móttøkuna og náttarvakt

## á Sjómansheiminum í Reykjavík

Søkt verður eftir fólkið til móttøkuna á Sjómansheiminum Ørkina í Reykjavík at byrja frá 1. august 2006 ella skjótast tilber. Eisini søkja vit eftir náttarvakt.

**Starvið í móttøkuni umfatar m.a. at:**

- hava ábyrgdina av allari móttøkuni frá 07.00 til 15.00 og 15.00 til 23.00 arbeiða 6 og frí 3 vaktir
- ábyrgdina av allari inn- og útbóking av gestunum
- móttaka bíleggingum, svarða fyrispurningum
- útskriva og senda ordraváttanir og fakturar
- vegleiða og hjálpa vitjandi
- taka sær av øllum fyrifallandi arbeiðið á heiminum

**Førleikakrøv:**
Vit rokna við at tú ert:

- persónligur kristin og tekur undir við grundarlagnum hjá Sjómansheiminum og Sjómansmissiónini.
- álítandi, fyrikomandi, sjálvstøgur og hevur samstarvsevni.
- skal helst kunna klára seg á Íslendskum og enskum (mál kann lærast)

**Løn og setanarviðurskiftir:**
Løn og setanarviðurskiftir eftir avtalu.
Umsókn skal sendast til:

**Stýrið fyri Sjómansheimið Ørkina í Reykjavík,**
Árni Jacobsen form.,
Millum Svalir 3, 520 Leirvík.

Upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Árna Jacobsen tel. 443265 ella Erland H Rasmussen, tel. 314699.

*Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík er knýtt at Hini Føroysku Sjómansmissiónini. Heimið, ið var tikið í nýtslu 1991, hevur 20 dupultkømur, matarhøli, fundarhøli o.a. liggur mitt í býnum. Umfram føroyingar vitja eisini íslendingar og aðrir útlendingar heimið. Hvørja viku eru møtir og onnur tiltøk á Føroyska Sjómansheiminum. Dentur verður lagdur á eitt kristiligt heim við góðari tænastu í rúsfríðum umhvørvi. Roynt verður at hava so nógv føroysk starvsfólk sum gjørligt.*



Vit hava tveir sera fittar kettlingar, sum vit fegin vilja lata. Teir eru 9 vikur gamlir, og búgva Undir Heygnum á Tvøroyri.

***Ring á tlf: 372810 ella 371365***